Barna- og útbúgvingarmálaráðið

Dagfesting:	20.02.2024
Mál nr.:	23/13188
Málsviðgjørt:	EMØ
Ummælistíð:	11.10.2023-31.10.2023
Eftirkannað:	20.02.2024

Uppskot til

Løgtingslóg
um
føroyskt sum annaðmál

Virkisøki

§ 1. Eftir reglunum í hesi løgtingslóg verður undirvísing og útbúgving í føroyskum sum annaðmál boðin øllum útlendingum, sum hava fingið uppihaldsloyvi í Føroyum og sum eru yvir undirvísingarskyldugan aldur sambært løgtingslóg um fólkaskúlan.

§ 2. Skipast kann fyri undirvísing í móðurmáli og fyri annaðmálsundirvísing í øðrum máli enn føroyskum fyri næmingar, sum eru fevndir av hesi løgtingslóg, og sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta mál.

Skipan av tilboðnum

§ 3. Undirvísingarstýrið skipar undirvísingina saman við samstarvsskúlum. Samstarvsskúlin kann vera ein av landsstýrisfólkinum góðkendur miðnámsskúli ella annar góðkendur skúli.

Stk. 2. Bústaðarkommunan skal vísa tilflytarum til nærmasta undirvísingarstað sambært stk. 1.

§ 4. Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um:
1) Innihaldið í undirvísingini.
2) Innihaldið í útbúgvingini.
3) Førleikakrøv til lærarar, sum undirvísa sambært hesi løgtingslóg.

§ 5. Undirvísing sambært hesi løgtingslóg kann eisini skipast sum umbiðin skeið.
Stk. 2. Undirvísingarstýrið skal góðkenna umbiðin skeið.
Stk. 3. Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um skeið sambært stk. 1, harundir reglur um luttøkugjald.

Upptøka

§ 6. Undirvísingarstýrið ger saman við samstarvsskúlunum leiðreglur viðvíkjandi

upptøku av næmingum, virksemi, undirvísingartilboðum, o.ø.

§ 7. Undirvísingarstýrið skipar í samstarvi við samstarvsskúlarnar fyri kunning, innskriving, visitatión og undirvísing sambært hesi løgtingslóg.

Námsætlan og próvtøka

§ 8. Undirvísing sambært hesi løgtingslóg skal fylgja námsætlan, sum landsstýrisfólkið letur gera.

§ 9. Undirvísing eftir hesi løgtingslóg kann enda við roynd ella próvtøku.

§ 10. Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um royndir og próvtøkur sambært hesi løgtingslóg.

Ábyrgd hjá samstarvsskúlum og setan av lærarum

§ 11. Samstarvsskúlin hevur námsfrøðiligu, fakligu og fyrisitingarligu ábyrgdina av undirvísingini.
Stk. 2. Samstarvsskúlin setur, í samráð við Undirvísingarstýrið, lærarar í starv at undirvísa sambært hesi løgtingslóg. Hvør skúli er eitt setanarøki, men samstarvsskúlarnir kunnu í samráð við Undirvísingarstýrið gera avtalu um samstarv viðvíkjandi lærarum.

Fígging

§ 12. Landið ber kostnaðin av undirvísing og útbúgving sambært hesi løgtingslóg, undantikið tó tey í § 5 nevndu skeið.

Ráðgevandi nevnd

§ 13. Landsstýrisfólkið setur ráðgevandi nevnd at hjálpa til við samskipan av undirvísing sambært §§ 1 og 2.
Stk. 2. Í nevndini sita eitt umboð fyri hvønn samstarvsskúla, Fróðskaparsetur Føroya, Útlendingastovuna, Nám og Undirvísingarstýrið.
Stk. 3. Umboðið fyri Undirvísingarstýrið er forfólk í nevndini.
Stk. 4. Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur fyri virki nevndarinnar.

Kærur

§ 14. Fyrisitingarligar og námsfrøðiligar avgerðir sambært hesi løgtingslóg kunnu innan 7 dagar frá tí, avgerðin er tikin, skrivliga kærast til landsstýrisfólkið.
Stk. 2. Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um kærur, harundir í hvønn mun og undir hvørjum treytum samstarvsskúlin kann bjóða næmingi endurroynd ella umdøming.

Gildiskoma

§ 15. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, hon er kunngjørd.

Endurskoðan

§ 16. Landsstýrisfólkið skal eftir trimum árum frá gildiskomu leggja fram fyri Løgtingið frágreiðing um, hvussu løgtingslógin hevur roynst, og um hon hevur virkað eftir ætlan.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Í nógv ár hevur undirvísing í føroyskum sum annaðmál fyri vaksin verið fyriskipað innan kommunala geiran og sum frítíðarundirvísing sambært kap. 3 í løgtingslóg um frítíðarundirvísing, (ll. nr. 70 frá 30. juni 1983 sum seinast broytt við ll. nr. 124 frá 10. desember 2003), sum snýr seg um serstaka frítíðarundirvísing. Kap. 7 í løgtingslóg um frítíðarundirvísing heimilar landsstýrismanninum at veita 100 % endurgjald fyri lønarútreiðslur til lærarar, sum undirvísa í eitt nú føroyskum sum annaðmál, men eru tað kommunurnar, ið rinda fyri raksturin av kvøldskúlanum.

Henda skipan hevur virkað væl, og hava tilflytarar kring landið havt møguleika fyri at tekna seg til styttri málskeið, ið hava lagt lunnar undir málsliga og samfelagsliga integratión. Men tann málsliga menningin hevur verið avmarkað, tá ið skeiðini eru stutt og ofta endurtøkur av skeiðum frammanundan.

Í Tórshavnar kommunu hevur frítíðarundirvísingin síðani 2011 eisini skipað fyri drúgvari málskeiðum – upp til 20 tímar um vikuna í umleið 15 vikur, og hava málskeiðini verið skipað við møguleika fyri framhaldi.

Í 2020 varð farið undir eina verkætlan at tryggja, at tilflytarar og borgarar kring alt landið, sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta mál, fáa somu møguleikar fyri at ogna sær førleikar í føroyskum máli og mentan og samfelagsviðurskiftum, og at tað verður lagdur dentur á at visitera og eftirmeta næmingarnar, so at støðugur framburður í førleikum verður tryggjaður. Tey tilmæli, sum skiftandi landsstýri hava útvegað um integratiónsviðurskifti, hava øll peikað á, at málslig menning er ein av fleiri fyritreytum fyri væleydnaðari integratión. Tað hevur víst seg, at tørvur er á einum útbúgvingartilboði í føroyskum sum annaðmál. At fyriskipa heilar útbúgvingar krevur meira, enn karmarnir í lógini um frítíðarundirvísing geva møguleika fyri. Tað var høvuðsorsøkin til, at gjørt varð av at arbeiða miðvíst fram eftir einari skipan, sum kann standa øllum tilflytarum og borgarum í boði, sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta mál, og sum er sambærilig við tey tilboð um málsliga menning, sum standa tilflytarum í boði í okkara grannalondum.

Ein námsætlan fyri føroyskt sum annaðmál fyri vaksin er gjørd, sum fylgir altjóða CEFR stiganum, og sum tryggjar, at útbúgvingin í øðrum máli í Føroyum er sambærilig við annaðmáls-útbúgvingar í Evropa, og sum tryggjar, at støðugur framburður er í útbúgvingartilgongdini hjá tí einstaka næminginum. Sambært hesari námsætlan verður í samstarvi við Próvstovuna arbeitt við royndum, sum eru fyritreytin fyri at flyta upp á hægri stig í undirvísingini og í útbúgving í føroyskum sum annaðmál (FSA-útbúgvingini). Eisini eru átøk sett í verk, sum hava til endamáls at útvega hóskandi undirvísingartilfar til føroyskt sum annaðmál, eins og Fróðskaparsetrið hevur fyriskipað diplomútbúgving fyri lærarum í føroyskum sum annaðmál.

Frá skúlaársbyrjan 2020 til 2023 hevur verið arbeitt sambært námsætlanini í Tórshavn eins og í Suðuroy, síðani 2021 eisini i í Vágum, og síðani á heysti 2022 á Kambsdali.

Tórshavnar kommuna hevur gjørt samstarvsavtalu við kommunurnar í Vágum, og eru tað nú tveir flokkar í Vágum. Í Tórshavnar kommunu er tørvurin á undirvísing í føroyskum sum annaðmál so nógv vaksin, at tað eru á vári 2023 stovnaðir 6 flokkar fyri vaksin, umframt ein móttøkuflokkur fyri eldri fólkaskúlanæmingar.

Kommunurnar í Suðuroynni hava gjørt samstarvsavtalu um undirvísing í føroyskum sum annaðmál, sum hevur tryggjað møguleika fyri, at tað nú eru 3 til 4 flokkar í føroyskum sum annaðmál, sum arbeiða eftir námsætlanini. Kvøldskúlaleiðslurnar í Runavík, í Fuglafirði, í Eysturkommunu og í Klaksvík hava í samstarvi við Barna- og útbúgvingarmálaráðið og leiðsluna á Miðnámi á Kambsdali avtalað at seta eina royndarskipan í verk, sum veitir undirvísing í føroyskum sum annaðmál sambært námsætlanini, og sum verður staðsett á miðnámsskúlanum á Kambsdali. Har er ein flokkur stovnsettur. Tað eru nógvir tilflytarar í hesum øki, og tørvurin er vaksandi.

Umframt tey drúgvu undirvísingartilboðini í føroyskum sum annaðmál verða styttri málskeið fyriskipað kring landið. Í 2023 hava tey verið umleið níggju.

Í 2022 varð serstøk játtan útvegað til at undirvísa ukrainskum flóttum. Í 2023 er henda játtan partur av játtanini til undirvísing í føroyskum sum annaðmál.

Í øllum Føroyum er tað ein avbjóðing hjá tilflytarum at fáa arbeiðslív, útbúgving og familjulív at hanga saman. Tað er ein sannroynd, at 40 tíma arbeiðsvika darvar møguleikanum hjá einum næmingi at gjøgnumføra drúgvari málskeið á upp til 20 tímar um vikuna.

Mett verður, at greið skipan fyri føroyskt sum annaðmál kann samskipa undirvísingartilboðini kring landið, so at sum flest fáa møguleika fyri at fylgja undirvísing og at tekna seg til royndir sambært galdandi námsætlan. Og mett verður at ein greið skipan kann tryggja allar tær stuðulsfunktiónir, sum eiga at vera, tá útbúgving verður fyriskipað, tryggja setanarviðurskiftini hjá undirvísarum, at allar GDPR-reglur um persónsviðkvæmar upplýsingar verða fylgdar o.a.

Tørvurin á undirvísing í føroyskum sum annaðmál veksur skjótt
At tørvurin veksur skjótt sæst eisini aftur á fíggjarlógini.

Í 2019 var játtanin til tímar til undirvísing í føroyskum sum annaðmál uml. 800.000 kr. Í 2022 var játtanin 2,3 mió. kr. umframt eina eykajáttan til ukrainskar flóttar á 1 mió. kr., og í 2023 var játtanin á leið 4. mio. kr.

Á fíggjarlógini fyri 2024 er á høvuðskonto 7.23.1.06. Føroyskt sum annaðmál, vaksin (Rakstrarj.) játtaðar 1.550 tús. kr. í 2024. Hetta er játtanin, sum hevur verið brúkt til verkætlanina, men sum skal leggjast um til eina varandi rakstrarjáttan til skipanina.
Á høvuðskonto 7.23.5.07. Frítíðarundirvísing (Rakstrarj.) (undirkonta 21. Undirvísing í føroyskum sum annaðmál) eru játtaðar 4.078 tús. kr. í 2024. Hetta er játtanin, sum er til sjálva undirvísingina.
Tilsamans gevur hetta uml. 5,6 mió. kr.

Niðurstøðan er, at tað er trupult hjá smærri kommunalum eindum at skipa fyri undirvísing og útbúgving í føroyskum sum annaðmál sambært námsætlanini, og hjá teimum størru kvøldskúlaskipanunum er tað eisini ein stór uppgáva at skipa fyri beinleiðis útbúgving. Tí tað krevjast heilt onnur atlit at útbúgvingarvirksemi enn til frítíðarundirvísingarvirksemi. Talan er um uppgávur, sum vanliga ikki eru álagdar sambært frítíðarundirvísingarskipanini, og sum

krevja nógv av lærarum, leiðslu, samskipan, skráseting, visitering, prótøkuhaldi, lestrarvegleiðing og lestrarmenning o.a.

Lagt kann verða afturat, at kommunalu frítíðarskipanirnar hava gjørt eitt megnar arbeiði, og lagt lunnar undir eina málskúlaskipan, sum hetta lógaruppskot byggir á herðarnar á.

Við hesum verður skotið upp, at Løgtingið samtykkir eina lóg um karmar fyri annaðmálsundirvísing kring allar Føroyar.

Uppskotið byggir víðari á grundarlagið, sum er lagt, men frá at vera tongt at kommunum, verður tað miðsavnað meira, soleiðis at tað verður Undirvísingarstýrið, sum fer at hava fyrisiting av umráðnum, í samstarvi við samstarvsskúlar kring landið.

Gera vit eina landsumfatandi skipan, so metir Barna- og útbúgvingarmálaráðið, at tørvur verður á umleið sjey ársverkum til undirvísing umframt fígging til t.d. prótøkufyriskipan, visitatión, rakstur og annað.

Orsøkin til, at lógaruppskotið verður framlagt er sostatt, at tørvur er á at skipa ein løgfrøðiligan karm fyri undirvísing av borgarum í Føroyum, sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta mál. Ein lógarkarm, sum er fleksibul og skjótt kann laga undirvísingartilboðini til tørvin hjá borgarum, samfelagnum og vinnuni og til ta til eina og hvørja tíð galdandi námsætlan, eins og til tann staðbundna tørvin.

1.2. Galdandi lóggáva

Undirvísing fyri borgarar, sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta mál, hevur higartil verið heimilað í lóg um frítíðarundirvísing kap. 3 um serstaka frítíðarundirvísing. Tørvur er tó á greiðari lógarheimild, so at starvsfólk kunnu setast í starv, og at útbúgving kann veitast samsvarandi námsætlan og við støði í prótvilfari, sum Prótvstovan útvegar. Somuleiðis er tørvur á samskipan, so at borgarar kring landið fáa sama útbúgvingarmøguleika.

1.3. Endamálið við uppskotinum

Endamálið við uppskotinum er at tryggja borgarum, sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta mál, neyðuga undirvísing í føroyskum. Mett verður, at tað er umráðandi, at tilflytarar læra um mentan og samfelag og at samskifta á føroyskum, tí hetta vil verða við til at tryggja eina góða integratión. Tessvegna eigur dentur eisini at verða lagdur á, at tað í undirvísingini verður tikið atlit at samleika og mentanarfatan næmingsins, sum er neyvt tongt at annaðmálslæring.

Fyri at tryggja, at allir tilflytarar fáa somur undirvísingar- og útbúgvingartillboð, verður tískil skotið upp at gera eina serliga annaðmál skipan, sum skal fevna um alt landið.

Uppskotið skal eisini tryggja, at ávísar vinnur, har tað verður mett neyðugt, kunnu umbiðja sær serstøk tilboð um undirvísing til síni starvsfólk. Tílík skeið kunnu verða fyriskipað fyri gjald, eftir reglum, sum landsstýrisfólkið letur gera.

Uppskotið byggir á eina miðsavnan av skipanini í Undirvísingarstýrinum, sum longu í dag fyrisitur útbúgvingarøkið í Føroyum, harundir eisini málsøkið føroyskt sum annaðmál.

Undirvísingarstýrið samskipar undirvísing sambært hesi lóg saman við góðkendum skúlum runt landið. Hugsað verður í fyrstu atløgu at brúka miðnámsskúlarnar sum sæti fyri undirvísing. Tað verður skúlin, sum í samstarvi við Undirvísingarstýrið setur neyðugu lærararnar til at undirvísa sambært hesi lóg.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Uppskotið hevur við sær, at landið átekur sær samskipandi ábyrgd av, at borgarar, sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta mál, kunnu nema sær útbúgving í føroyskum sum annaðmál kring alt landið. Harnæst gevur lógaruppskotið heimild til at fara undir móðurmálsundirvísing. Áseting um móðurmálsundirvísing var ikki við í upprunauppskotinum, men er tikið við, eftir at ynski um hetta kom fram á hoyringarfundi og í hoyringarviðmerkingum við tilsipan til, at kunnleiki til móðurmálið hongur saman við evnunum at læra annaðmál.

1.5. Ummæli og ummælisskjal

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá kvøldskúlum, sum undirvísa í føroyskum sum annaðmál, Útlendingastovuni, Vinnuhúsinum, Samtak, Starvsfelagnum, Føroya Lærarafelag, Pedagogfelagnum, Undirvísingarstýrinum, NÁM, Fróðskaparsetri Føroya, Kommunufelagnum, Reyða Krossi umframt øllum aðalráðum.

Viðmerkingar frá Undirvísingarstýrinum (UVS)

Undirvísingarstýrið tekur undir við at fáa skipaðar karmar um føroyskt sum annaðmál.
UVS viðmerkir tó, at tað er óheppið seta á stovn ein nýggjan stovn (Málskúlin) við einum málskúlsaleiðara , “sum upprunauppskotið legði upp til, vísandi til, at vit longu í dag hava skipan, sum tekur sær av undirvísingarøkinum.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur tikið viðmerkingina til eftirtektar, og skipanin verður ikki, sum upprunaliga ætlað, skipað sum ein stovnur fyri seg, men verður kjølfest í UVS, sum saman við samstarvsskúlunum samskipar undirvísingina.

UVS viðmerkir harnæst, at tað er óheppið, at uppskotið fevndi um næmingar frá 12 árum, tí hesir vera longu fevndir av øðrum skipanum.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur tikið viðmerkingina til eftirtektar og hevur tillagað uppskotið soleiðis, at tað einans fevnir um næmingar, sum eru yvir undirvísingarskyldugan aldur sambært løgtingslóg um fólkaskúlan.

Undirvísingarstýrið vísir harnæst á møguleikan fyri at skipa fyri annaðmáls undirvísing í frítíðarundirvísingarlógini.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur ikki tikið hesar viðmerkingar til eftirtektar, og víst verður í hesum sambandi til pkt. 1.1 og pkt. 1.2., har greitt verður frá, at frítíðarundirvísingarskipanin ikki sýnist rúma annaðmálsøkinum, sum er støðugt vaksandi.

Undirvísingarstýrið vísir á, at um lestrarstuðul skal veitast teimum, sum taka føroyskt sum annaðmál fulla tíð, so má lestrarstuðulslógin broytast.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at støða ikki er tikin til, í hvønn mun henda lóg skal broytast ella ikki.

Undirvísingarstýrið heldur ikki, at upprunauppskotið var búgvið at senda víðari í skipanini, og mælti til, at ráðið saman við teimum endurhugsaði skipanina.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur tikið viðmerkingina til eftirtektar, og er fyriliggjandi uppskot gjørt í tøttum samstarvi við Undirvísingarstýrið.

Viðmerkingar frá NÁM
NÁM mælir til nýggja endamálsorðing, vísandi til upprunaorðingina um, at undirvísingin skal fevna um næmingar frá 12 árum.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at henda viðmerking er tikin til eftirtektar, sjá omanfyri, so at uppskotið nú viðvíkur næmingum, sum eru yvir undirvísingarskyldugan aldur.

NÁM hevur viðmerkingar til, at settur verður á stovn ein nýggjur stovnur og stjóri fyri henda, sum uppruna uppskotið legði upp til.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur tikið viðmerkingina til eftirtektar, og skipanin verður ikki, sum upprunaliga ætlað, skipað sum ein stovnur fyri seg, men verður kjølfest í UVS, sum saman við samstarvsskúlunum samskipar undirvísingina.

NÁM hevur viðmerkingar til prótøkuásetingar, eitt nú, at tað er umráðandi, at prótøkur bara verða fyriskipaðar 2 ferðir um árið, soleiðis at Prógstovan kann planleggja eftir hesum.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur tikið hesa viðmerking til eftirtektar, soleiðis at prótøka skal fyriskipast 2 ferðir um árið. Tó verður møguligt hjá næmingi mitt í lestrarhálvuni at taka eina roynd, um mett verður, at viðkomandi næmingur kann flytast á eitt hægri undirvísingarstig. Hetta er fyri at tryggja, at næmingar eisini kunnu koma skjótt ígjøgnum skipanina.

NÁM viðmerkir, at tað má vera greitt, hvørji námsætlan undirvísast skal eftir.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur tikið hesa viðmerking til eftirtektar og nágreinað hetta í serligu viðmerkingunum til § 8, at talan er um námsætlan FSA fyri vaksin.

NÁM viðmerkir, at tað má vera greitt, um undirvísingin skal enda við roynd ella prótøku.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur í ávísan mun roynt at tillaga uppskotið, soleiðis at tað tykist meir greitt, nær talan kann vera um roynd ella prótøku. Umráðandi er tó at hava í huga, at talan ikki er um prótøkuskylduga undirvísing, sum neyðturviliga skal enda í prótøku; tað vil altíð vera upp til næmingin sjálvan at avgera, um hann skal fara upp í roynd ella ikki, og er undirvísing sambært hesi lóg ikki at síggja sum eitt krav, men einans eitt tilboð.

NÁM hevur viðmerkingar til kærufreistina, sum varð sett til 4 vikur.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur tikið hesa viðmerking til eftirtektar, soleiðis at kærufreistin sambært hesi lóg er tann sama, sum í eitt nú miðnámsskúlalógini, vísandi til, at tað er umráðandi, at t.d. próvdómarar o.o. hava prótøku feska í minninum, tá kæran verður viðgjørd.

NÁM hevur fleiri viðmerkingar til orðingar v.m. í sambandi við prótøkur og undirvísingartilfar.
Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur fyri prótøkur v.m., og er tað ætlanin her at inddraga NÁM / Prógstovuna í tað arbeiðið, so tryggjað verður, at fakliga vitanin, sum liggur á stovninum, fær nøktandi árin á reglurnar, sum skulu galda fyri økið.

Viðmerkingar frá Kommunufelagnum
Yvirskipað hevur Kommunufelagið viðmerking til uppruna uppskotið, sum hevði við sær ein málskúla og bygdi á kommunal samstørv.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur tikið viðmerkingina til eftirtektar, og skipanin verður ikki, sum upprunaliga ætlað, skipað sum ein stovnur fyri seg, men verður kjølfest í UVS, sum saman við samstarvsskúlunum samskipar undirvísingina. Sostatt verður ikki talan um eina skipan, sum fær so stórar umsitingarligar- ella fíggjarligar avleiðingar fyri kommununa.

Viðmerkingar frá Miðnámskúlanum á Kambsdali
Skúlin viðmerkir tann yvirskipaða leistin, sum uppruna uppskotið legði upp til viðvíkjandi málskúla. Sum nevnt omanfyri, eru viðmerkingar hesum viðvíkjandi tiknar til eftirtektar.

Skúlin heitir á ráðið um at verða tikin við, tá kunngerðir verða gjørdar, sum skulu áseta nærri reglur fyri virksemið.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at ráðið ynskir at hoyra allar viðkomandi partar, tá kunngerðir verða tilevnaðar, og fer eisini at inddraga Miðnám á Kambsdali í tann mun, hetta verður mett skilagott. Vísandi til at skúlin hevur góðar royndir við undirvísing í føroyskum sum annaðmál, er tó ikki óhugsandi, at tey verða inddrigin lutfalsliga nógv, tá talan verður um at gera nærri reglur, soleiðis at tær royndir, sum eru gjørdar á økinum, eisini verða brúktar í framtíðar reglum, í t.d. kunngerðum.

Skúlin hevur viðmerkingar til setan av lærarum innan økið.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal vísa á, at við at tillaga uppskotið soleiðis, at talan verður um eitt samstarv millum ávikavist UVS og teir einkultu skúlarnar, fáa skúlarnir eisini høvi til at ávirka setanir. Harnæst vil ein lóg á økinum eisini verða við til at tryggja lærarunum innan annaðmálsøkið betri setanarsømdir, við tað at arbeiðið nú verður fyriskipað betur og langsiktað.

Viðmerkingar frá Reyða Krossi
Reyði Krossur metir tað vera óheppið, um upptøka bara kann vera tvær ferðir um árið, tí umráðandi er, at tilflytarar skjótast gjørligt kunnu fara undir at fáa undirvísing.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið tekur undir við sjónarmiðnum hjá Reyða Krossi, og tískil er ásett í § 6, at Undirvísingarstýrið ger neyðugar leiðreglur fyri upptøku. Sjálvt um tað verður koyrt í lestrarhálvárum, er eisini ynskiligt, at talan skal vera um eina skipan, har næmingur kann verða visiteraður lutfalsliga skjótt. Hóast hetta, so má ásannast, at ávíst planleggingararbeiði má vera í sambandi við undirvísing sambært hesi lóg, og tískil kann ongin váttan fáast fyri, at næmingur beint eftir at vera fluttur til Føroyar skal kunna fáa undirvísing. Men endamálið við upptøkureglunum og visitatiónsreglum v.m. sambært § 6 og § 7 er heilt greitt at fáa samskipað nøktandi planlegging við nøktandi atgongd, t.v.s. eina so smidliga skipan sum gjørligt.

Reyði Krossur ynskir, at ásettar verða reglar um ferðastuðul fyri teir tilflytarar, sum hava lutfalsliga langt at ferðast til undirvísingarstaðið.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal vísa á, at henda viðmerking ikki verður tikin til eftirtektar í fyriliggjandi lóg, sum einans snýr seg um skipan av annaðmáls undirvísing og útbúgving í Føroyum, og ikki ferðastuðul.

Viðmerkingar frá Útlendingastovuni
Útlendingastovan fegnast um, at landið setur løgfrøðiligan karm um undirvísing í føroyskum sum annaðmál.
Útlendingastovan metir ikki, at tað er greitt, hvør er fevndur av lógini.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at lógin er nágreinað, soleiðis at talan er um tilflytarar, sum hava uppihaldsloyvi og eru yvir fólkaskúlaaldur, sjá § 1, og serligu viðmerkingarnar til hesa.

Útlendingastovan metir eisini, at tað er umráðandi at tilskila, um talan er um ókeypis undirvísing ella ikki.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal vísa á § 12, sum sigur, at talan er um ókeypis undirvísing. Í ávísum førum er tað møguligt hjá t.d. virkjum, at umbiðja skeið.

Útlendingastovan vísir á møguligar politiskar ætlanir um at seta eina sokallaða máltreyt í kunngerð um varandi uppihaldsloyvir, og metir tískil m.a., at tað er umráðandi, at vit hava eina smidliga skipan, hvat undirvísing í føroyskum sum annaðmál viðvíkur.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at í hvønn mun treytir um føroyskar málførleikar verða ásettar í aðrari lóggávu ber ikki til at siga, og kann ráðið tískil ikki fyrihalda seg til hetta í verandi løtu. Tó, um treytir fyri føroyskum málkunnleika verða settar í framtíðini í aðrari lóggávu, so letur fyriliggjandi lóg upp fyri, at neyðug undirvísing og útbúgving kann fáast sambært hesi lóg.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal harnæst viðmerkja, at tað ikki ber til at tilevna eina lóggávu um annaðmáls førleikar, harundir føroyskt sum annaðmál til eina ikki ítøkiliga lóggávu um uppihaldilóyvi, integrátion o.a.

Útlendingastovan vísir á, at skipanin við einum málskúla sum upprunaliga ætlað ikki tykist greið.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur tikið viðmerkingina til eftirtektar, og skipanin verður ikki, sum upprunaliga ætlað, skipað sum ein stovnur fyri seg, men verður kjølfest í UVS, sum saman við samstarvsskúlunum samskipar undirvísingina.

Viðmerkingar frá Føroya Arbeiðsgevarafelag
Føroya Arbeiðsgevarafelag tekur undir við skipan av undirvísing í føroyskum fyri tilflytarar,
FA tekur ikki undir við hugskotinum um at skipa arbeiðið í sjálvstøðugum stovni og fyrisiting.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur tikið viðmerkingina til eftirtektar, og skipanin verður ikki, sum upprunaliga ætlað, skipað sum ein stovnur fyri seg, men verður kjølfest í UVS, sum saman við samstarvsskúlunum samskipar undirvísingina.

Føroya Arbeiðsgevarafelag vísir á týdningin av einari smidligari skipan, hvat undirvísingar- og arbeiðstímum viðvíkur, og skjýtur upp, at ein loysn kundi verið at minka um kravdu arbeiðstímarnar til tey, sum koma úr 3. londum til 30 tímar um vikuna, eins og ásett er fyri borgarar út ES.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal viðmerkja, at kravdu arbeiðstímarnir eru ásettir í aðrari lóggávu, sum ikki liggur undir ráðnum. Ráðið hevur tískil ikki tikið viðmerkingarnar til eftirtektar.

FA fegnast um møguleikar hjá virkjum og fyritøkum at fáa umbiðin skeið, samstundis sum at tey vanligu skeiðini verða ókeypis, tí síðstnevnda kann vera umráðandi fyri smærri fyritøkur, sum ikki hava ráð til at keypa sær skeið.

FA undrast á, at kærumál skulu leggjast til landsstýrisfólk og ikki verða víst til Føroya Kærustovn.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal vísa á, at ongar kærur innan útbúgvingar- og undirvísingarøkið verða beindar til Kærustovnin.

Spurningurin um, í hvønn mun kærur sambært hesari lóggávu skulu fyrileggjast Kærustovninum ístaðin, eigur sostatt at verða tikin upp í sambandi við yvirskipaða tilgongd viðvíkjandi kæruviðgerð innan málsøkið hjá Barna- og útbúgvingarmálaráðnum.

Viðmerkingar frá Fróðskapasetri Føroya
Fróðskaparsetur Føroya fegnast um, at økið nú verður skipað og raðfest.

Fróðskaparsetur Føroya viðmerkir, at lógin ikki áleggur teimum nakrar skyldur, og setur spurnartekin við, um Setrið verður tikið við, tá talan er um útbúgving og førleikamenning av lærarum, og hvussu eitt nú útbúgvingin og skeið verða dygdarmett v.m.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal vísa á § 4, har ásett er, at nærri reglur koma viðvíkjandi krøvum til lærarar, undirvísing og útbúgving. Í hesum sambandi er ætlanin eisini at inndraga Fróðskaparsetur Føroya, sum fær høvi til at koma við íkasti til, hvussu hesar reglur møguliga skulu gerast. Tó vil tað í síðsta enda vera landsstýrisfólkið, sum ger av, hvussu hesar reglur skulu síggja út.

Fróðskaparsetur Føroya vísir á manglandi samband millum skipaninia og gransking.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið ásannar, at granskingarparturin sum so ikki er partur av hesi skipan. Tó er ásett í § 14, at nevnd skal setast, har Fróðskaparsetur Føroya er við, sum skal hjálpa til at samskipa økið, lógin fevnir um, betur. Í stk. 4 til hesa grein er ásett, at landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur um virksemið hjá nevndini, og er tað tí latið upp fyri, at mann í hesum reglum eisini gevur nevndini heimild til at taka stig til møguligar eftirmetingar o.a. Barna- og útbúgvingarmálaráðið hevur tískil umorðað hesa grein frá uppruna uppskotinum, soleiðis at henda nevnd nú eisini fevnir um umboð frá Fróðskaparsetri Føroya.

Viðmerkingar frá Umhvørvismálaráðnum
Umhvørvismálaráðið vísir á, at tað er ein sannroynd, at trupult kann vera hjá tilflytarum at gjøgnumføra eina útbúgving í føroyskum sum annaðmál, samstundis sum teir skulu hava eina arbeiðsviku á 40 tímar.
Umhvørvismálaráðið vísir víðari á, at arbeitt verður við at stytta arbeiðsvikuna til 37 tímar, men metir ikki, at hetta fer at broyta tað stóra uppá tað, at fáa arbeiðslívið, útbúgving og familjulív at hanga saman.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið ásannar, at tað kann vera trupult hjá tilflytarum at fáa arbeiðslívi o.a. at hanga saman, men vil vísa á, at fyriliggjandi lóg júst skal virka fyri einari smidligari skipan, sum í so góðan mun sum gjørligt tekur atlit til øll viðurskifti. Tó er tað ein sannroynd, at fyriliggjandi lóg einans kann áseta og viðgera útbúgvingarpartin, meðan onnur atlit, harundir stytt arbeiðsvika og krav um 40 tíma arbeiðsviku hjá tilflytarum uttanfyri ES, liggur uttanfyri hesi lóg.

Viðmerkingar frá Løgmálaráðnum
Løgmálaráðið vísir á týdningin av, at undirvísingin eisini skapar innlit í samfelagslig viðurskiftir.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal í hesum sambandi vísa á, at hetta er nakað, sum er við í námsætlanini fyri FSA, har ein yvirskrift júst er " Mentanarlig og samfelagslig endamál".
Harnæst framgongur í serligu viðmerkingunum til § 1, at eitt av endamálunum við at læra føroyskt júst skal vera at fáa nøktandi innlit í hesi viðurskiftir.

Løgmálaráðið mælir til eina smidliga skipan, soleiðis at samanhangur kann vera millum arbeiðslívið og familjulívið.
Barna- og útbúgvingarmálaráðið skal vísa á, at undirvísing verður løgd til rættis hvørt hálvár, men at tað eisini í leiðreglunum fyri upptøku, sum Undirvísingarstýrið letur gera, kann latast upp fyri upptøku alt árið.
Harnæst er vert at viðmerkja, at skipanin eisini ger tað møguligt hjá fyritøkum / virkjum at biðja um skeið, soleiðis at arbeiðstakarin lættari og skjótari kann læra føroyskt, sum eisini í síðsta enda má sigast at koma arbeiðsgevaranum til góðar.

Harnæst hevur Løgmálaráðið eisini nakrar viðmerkingar til orðingar, sum í ávísan mun eru tiknar til eftirtektar.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Í 2019 var játtanin til tímar til undirvísing í føroyskum sum annaðmál uml. 800.000 kr. Í 2022 var játtanin 2,3 mió. kr. umframt eina eykajáttan til ukrainskar flóttar á 1 mió. kr., og í 2023 var játtanin á leið 4 mió. kr.

Í fíggjarlógini fyri 2024 eru samanlagt settar uml. 5,6 mió. kr. av til føroyskt sum annaðmál.

Við at seta á stovn eina landsumfatandi skipan verður mett, at tørvur er á 7 ársverkum til undirvísing, og hálvumøðrum til leiðslu v.m., og verður tað sostatt talan um 8,5 ársverk.

Upp í hesi 8,5 ársverkini eru ikki roknað framleiðsla av undirvísingartilfari, framleiðsla av prótøkutilfari og skeiðs- og eftirútbúgvingarvirksemi. Hesar uppgávur vóru loystar innan játtanina til verkætlanina, sum í dag er deild sundur millum Nám, Próvstovu og UVS. Mett verður tí, at samlaði tørvurin á játtan til økið (t.e. undirvísing+leiðsla+uppgávugerð+gerð av undirvísingartilfari) verður sostatt uml. 7 mió. kr. um árið.

Viðmerkjast skal tó, at tað kann vera trupult við vissu at siga, í hvønn mun fígging av undirvísing í føroyskum sum annaðmál fer at økjast ella ikki tey komandi árini, tí hetta heilt er knýtt at talinum av tilflytarum, umframt ynskjum teirra at nema sær kunnleika til føroyskt. Tað er tó eyðsæð, at um krav verður sett til útbúgving í føroyskum í aðrari lóggávu, harundir einari møguligari intergratiónslóg, so má hædd takast fyri møguligari øktari játtan til økið, tí tað tá ikki longur verður talan um eina skipan, sum er sjálvboðin, men at tað tá verður eitt krav, so tískil kann roknast við fleiri næmingum.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Fyrisitingin av føroyskum sum annaðmál hevur inntil 1. juli 2023 ligið í Barna- og útbúgvingarmálaráðnum, men varð seinni flutt til Undirvísingarstýrið at fyrisita.

UVS er í ferð við at tillaga organisatiónina soleiðis, at starvsfólk eisini burturav koma at arbeiða við hesum økinum.

Av tí at umsitingin av skipanini verður løgd til Undirvísingarstýrið, veksur fyrisitingarliga uppgávan hjá teimum.

Við at fara frá einari kvøldskúlaskipan yvir í eina skipan fyri alt landið, sum landið varðar av, og har undirvísing í fyrstu atløgu verður løgd út á miðnámsskúlarnar, vil uppskotið óivað minka um umsitingarligu skyldurnar hjá kommununum.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Mett verður, at vinnan í Føroyum hevur stóran tørv á útlendskari arbeiðsmegi, og at arbeiðsmegin, sum kemur til Føroya, hevur tørv á undirvísing í føroyskum sum annaðmál til tess at útinna vinnuligu uppgávurnar á bestan hátt.

Vinnan kann koma í ta støðu, at útlendska arbeiðsmegin hevur tørv á umstøðum at fara á málskúla.

Vinnan fær harumframt møguleika fyri at biðja um beinleiðis málrættaði málskeið til ta arbeiðsmegi, sum ein ávís fyritøka hevur tørv á.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Øll øki í landinum fáa møguleika fyri at bjóða borgarum, sum hava annað mál enn føroyskt sum sítt fyrsta mál í sínum øki, javnlík undirvísingartilboð.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Eitt av høvuðsendamálunum við hesum uppskoti er at tryggja eina so væleydnaða integratión sum møguligt. Tað ávirkar allar samfelagsbólkar, og allar samfelagsskipanir rættan veg, um tað eydnast at skipa integratiónina, so at borgarar, sum ikki hava føroyskt sum sítt fyrsta mál, fáa somu møguleikar og rættindi til inklusión og útbúgving og verða javnsett á arbeiðsmarknaðinum og í samfelagnum við føroyingar. Eins og møguleikar fyri framhaldandi menning.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri nakran millumtjóða sáttmála.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar fyri tvørgangandi sáttmálar.

1) **Hoyvíkssáttmálin**
   Tað er einki í lógaruppskotinum, sum ikki sampakkar við Løgtingslóg nr. 66 frá 18. mai 2006 um at seta í gildi Hoyvíkssáttmálan - Sáttmáli millum stjórn Íslands, øðrumegin, og stjórn Danmarkar og Føroya landsstýri, hinumegin.

2) **Evropeiski mannarættindasáttmálan, EMRS**

Tað er einki í lógaruppskotinum, sum ikki sampakkar við Anordning nr. 136 af 25. februar 2000 om ikrafttræden for Færøerne af lov om den europæiske menneske-rettighedskonvention.
Ein rød av ískoytisprotokollum er løgd afturat sáttmálanum gjøgnum árini. Í Føroyum er í gildi høvuðssáttmálin frá 4. november 1950, sum broyttur við protokoll nr. 3, 5, 8, 10 og 11 og ískoytisprotokollirnar nr. 1, 4, 6 og 7.

3) **Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek**
Tað er einki í lógaruppskotinum, sum ikki sampakkar við Bekendtgørelse nr. 20 af 15. november 2017 af FN-konvention af 13. december 2006 om rettigheder for personer med handicap.

Sáttmálin er kunngjørdur við *Bekendtgørelse nr. 20 af 15. november 2017 af FN-konvention af 13. december 2006 om rettigheder for personer med handicap*.

Danska Institut for menneskerettigheder hevur gjørt eina leiðbeining um sáttmálan: www.menneskeret.dk
(Sí nr. 1.2.2.8. í rundskrivinum um lógarsmíð).

2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið elvir ikki til markaforðingar, og ongar kendar markaforðingar eru á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um revsing, útpanting, sektir ella onnur inntriv.

2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

2.12. Gjøld
Lógaruppskotið gevur landsstýrisfólkinum heimild at skipa undirvísing í føroyskum sum annaðmál fyri gjald. Talan kann verða um serlig umbiðin skeið, sum annaðhvørt ein almenn ella ein privat fyritøka biður um.

Endamálið við heimildini at áleggja gjøld er einans at kunna skipa fyri serligt umbidnari undirvísing í føroyskum sum annaðmál. Endamálið er ikki at at hava eitt yvirskotsbaserað virksemi. Tað merkir, at gjald fyri umbiðin skeið kann ikki verða hægri enn kostprísurin fyri umbidna skeiðið.

Við heimildini kann landsstýrisfólkið áseta reglur um gjald fyri serstaka undirvísing í føroyskum sum annaðmál

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?

Lógin gevur heimild til landstýrisfólkið at áseta nærri reglur fyri útbúgving**,** undirvísing og førleikakrøv til lærarar (§4), reglur fyri umbiðin skeið og gjald fyri hesi (§§ 5 og 10), royndir og prótøku sambært hesi lóg (§ 10) umframt reglur fyri virksemið hjá ráðgevandi nevndini og kærur (§§ 14 og 15)

Harnæst verður heimild givin Undirvísingarstýrinum at gera leiðreglur um upptøku (§6)

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Lógaruppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Lógaruppskotið fer at stuðla upp undir, at borgarar, sum ikki hava føroyskt sum fyrsta mál, fáa amboð, ið kunnu stuðla undir góða integrátion. Við at bjóða undirvísing í føroyskum sum annaðmál, verður tilgongdin betri til ein gerandisdag, harundir eisini sosialar relatiónir, arbeiðslív v.m.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	ja	nei	Nei	ja	ja
Umsitingarligar avleiðingar	ja	ja	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar	[redacted]		Nei	ja	[redacted]

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Ásetingin nágreinar virkisøkið, sum er undirvísing og útbúgving fyri allar tilflytarar, sum koma til Føroya. Treytin fyri at verða fevndur av lógini er, at tilflytari hevur eitt galdandi uppihaldsloyvi. Harnæst er treytin fyri at verða fevnd av lógini, at talan er um næming sum er yvir undirvísingarskyldugan aldur sambært løgtingslóg nr. 125. frá 20. Juni 1997 um fólkaskúlan.

Undirvísingin hevur til endamáls at menna samskiftisførleika næmingsins, málsligu førleikar næmingsins, og geva næminginum innlit í føroysk mentanarlig og samfelagslig viðurskifti. Undir hesum eigur undirvísingin at taka atlit at samleika- og mentanarfatan næmingsins, sum er neyvt tongd at annaðmálslæring.

Greinin brúkar heitini "undirvísing" og "útbúgving". Orsøkin til hetta skal síggjast í ljósinum av, at talan er um sjálvbodna og ikki kravda undirvísing, sum neyðturviliga er prótøkuskyldug sambært § 10.

Tilflytarar, sum eru í fólkaskúlaaldri, fáa í dag undirvísing smbrt. kunngerð nr. 144 frá 6. oktober 2020 um undirvísing í føroyskum sum annaðmál og móðurmálsundirvísing, og eru tí ikki fevndir av hesi lóg.

Tilboðið í § 1 skal standa øllum tilflytarum, óansæð bústaðarkommunu, í boði.

Til § 2
Ásannandi at kunnleiki til móðurmálið er fortreyt fyri at læra føroyskt sum annaðmál betur, verður heimild givin til at skipa fyri móðurmálsundirvísing.

Harnæst gevur greinin heimild til at skipa fyri aðrari annaðmálsundirvísing enn føroyskum. Hetta kundi verið t.d. undirvísing í donskum, vísandi til, at tað eisini eru tilflytarar, sum ynskja at brúka útbúgvingarskipanina í Føroyum, har danskt t.d. í ávísan mun er ein kravd lærugrein. Fyri at tryggja, at hesi eisini kunnu taka víðariútbúgving í Føroyum, letur lógin tí upp fyri, at farast kann undir aðra annaðmálsundirvísing enn føroyskt.

Til § 3
Undirvísing sambært hesi lóg kann fara fram í einum miðnámsskúla, ella einum øðrum av landsstýrisfólkinum góðkendum skúla. Hetta fer longu fram í dag, eitt nú á Miðnámi á Kamsdali, har undirvíst verður í føroyskum sum annaðmál, og hevur hetta riggað sera væl.

Í sambandi við gerð av fyriliggjandi lóg hevur samband verið við miðnámsskúlarnar í Hovi, á Kambsdali umframt Glasir, har ætlanin er í fyrstu syftu, at undirvísingin skal fara fram. Orsøkin til at hesir skúlar eru valdir út (og t.d. ikki í Vestmanna í fyrstu syftu), er ynski um ávísa miðsavnan av undirvísingini. Við at byrja í teim størru miðnámsskúlunum verður eisini tryggjað, at allir tilflytarar, óansæð bústaðarkommunu, hava møguleika fyri, at møta til undirvísing.

Tað verður Undirvísingarstýrið sum saman við samstarvsskúlunum skal samskipa undirvísing runt landið.

Stk. 2. Tað er fyrsta tilflytara kommunan, har tilflytari fær bústað, sum hevur skyldu til at kunna tilflytarar um tilboð um undirvísing sambært hesi lóg.

Til § 4
Ásetingin gevur heimild til at áseta reglur um undirvísing, útbúgving og krøv til lærara.

Viðvíkjandi undirvísing er umráðandi, at henda verður skipað soleiðis, at nøktandi atlit verður tikið til samleika og mentanarfatan næmingsins, sum er neyvt tongd at annaðmálslæring.

Tá ið næmingur byrjar undirvísingina verður hann/hon visiteraður inn á útbúgving og modul, og fyri at skifta frá einum moduli upp á næsta modul skal næmingur standa eina stigroynd. Hetta er nakað sum undirvísingarstaðið í samráð við UVS skal skipa, og ásetur landsstýrisfólkið nærri reglur um hetta.

Umráðandi er, at tey, ið undirvísa í føroyskum sum annaðmál, hava nøktandi fakligar og námsfrøðiligar førleikar, harundir nøktandi førleikar til annaðmálsfrálæru. Tískil verður heimild veitt landsstýrisfólkinum at áseta nærri reglur um hetta.

Til § 5
Ásetingin heimilar umbiðin skeið fyri borgarar, sum ikki hava føroyskt sum sítt fyrsta mál. Hesi skeið kunnu venda sær til ávísan málbólk, og verða heilt ella partvíst fíggjað av tí, sum biður um skeiðið. Tað kann vera antin privatur ella almennur stovnur ella felagsskapur, sum biður um hesi skeið.

Sum dømi kann nevnast, at Undirvísingarstýrið eftir umbøn frá privatum ella almennum stovni fyriskipar skeið fyri komandi starvsfólk innan vælferðargeiran, ella innan eina ávísa vinnugrein, t.d. har eitt virki biður um at fáa skipað eitt styttri skeið í føroyskum sum annaðmál, fyri bólk av arbeiðstakarum teir varða av, t.d. innan fiski- tænastu- ella byggivinnuna, har nógvir tilflytarar hava arbeiði.

Stk. 2 vísir til, at tað er Undirvísingarstýrið sum skal góðkenna tey skeið sum verða umbiðin. Hetta er fyri at tryggja eina nøktandi og samanhangandi undivísingar- og útbúgvingarskipan, tá talan er um føroyskt sum annaðmál.

Stk. 3 gevur heimild til at taka gjald fyri umbiðin skeið. Hesi skeið verða umframt tey, sum annars er ókeypis, og er nakað, sum vinnan, harundir eisini arbeiðsgevarafelagið, hevur tikið undir við. Talan er tó einans um gjøld, sum dekka veruligan umkostnað av einum fyriskipaðum skeiði.

Til § 6
Lógin byggir á eina skipan, sum er kjølfest í Undirvísingarstýrinum, men har undirvísingin fer fram úti á eitt nú miðnámsskúlunum. Umráðandi er, at bæði skúlar og UVS eru við til at skipa økið, soleiðis at upptøka, undirvísingartilboð o.a. verður gjørt smidligt og eins yvir landið. Í sambandi við gerð av leiðreglum eigur at verða hugsað um møguleikan hjá næmingum at koma inn í skipanina mitt í lestrarhálvuni.

Ásetingin tryggjar sostatt, at økið ikki bara verður skipað sentralt frá UVS, men at teir einstøku skúlarnir verða tiknir við uppá ráð, tá arbeiðið skal skipast heilt yvirskipað, men eisini við atliti til tann einstaka skúlan.

Til § 7
Umráðandi er, at allir borgarar verða javntstillaðir og fáa nøktandi tilboð sambært hesi lóg, óansæð bústaðarkommunu.

Endamálið skal alla tíðina verða, at skipa eina gjøgnumskygda og smidliga skipan, sjá § 8 og serligu viðmerkingarnar til hesa.

Tað er skyldan hjá Undirvísingarstýrinum at tryggja, at tilboð um føroyskt sum annaðmál er atkomuligt fyri allar tilflytarar í Føroyum, og skal Undirvísingarstýrið harnæst saman við samstarvsskúlanum skipa útbúgvingina og undirvísingina soleiðis, at nýggir tilflytarar fáa so stutta bíðitíð sum møguligt.

Til § 8
Undirvísingin skal fara fram sambært námsætlanini fyri føroyskt sum annaðmál fyri vaksin, og byggir hendan námsætlanin á altjóða evropeisku CEFR skipanina.

CEFR merkir: Common European Framework of Education, og er ein altjóða viðurkend skipan, sum tryggjar gjøgnumskygni millum førleikastig og kommmunikativar førleikar (samskiftisførleikar), sum hin einstaki tilflytarin/næmingurin hevur ognað sær.

Námsætlanin er skipað sum tríggjar útbúgvingar FSA1, FSA 2 og FSA 3 (t.e. føroyskt sum annaðmál á ymiskum stigum). Næmingur verður visiteraður inn á ta útbúgving, sum hóskar best til undanførleikarnar hjá næminginum. Hvør útbúgving er skipað í fýra modul, og vanliga kann ein næmingur avgreiða eitt modul hvørja lestrarhálvu. Tað ber tó til at koma gjøgnum útbúgvingina væl skjótari, um næmingur megnar at standa eina innanhýsis roynd skjótari, sjá serligu viðmerkingarnar til § 9.

Landsstýrisfólkið kann, eins og við øðrum námsætlanum, tillaga námsætlanina í tann mun, hetta við tíðini gerst neyðugt. Hetta arbeiðið verður skipað á sama hátt, sum arbeiðið við øðrum námsætlanum,

Til § 9
Undirvísing eftir hesari lóg kann enda við roynd ella prógvtøku. Orðingin “kann” sipar til, at talan her í útgangsstøði er um útbúgving, sum ikki er prógvtøkuskyldug.

Skynað verður á millum prógvtøkur, sum Prógvstovan og samstarvsskúlin fyriskipa, og innanhýsis royndir, sum lærarin í samráð við undirvísingarstaðið og UVS samskipar.

Innanhýsis royndir kunnu fyriskipast t.d. har ábending er um, at næmingurin hevur førleika á einum hægri stigi enn hann er plaseraður, soleiðis at hesin kann verður fluttur upp á hægri stig. Hervið verður tryggjað ein smidlig skipan fyri teir næmingar, sum hava góð evni til at læra nýtt mál.

Ávegis próvtøkur og innanhýsis royndir verða eftirmettar við próvmetinum staðið / ikki staðið, meðan endaroyndin verður eftirmett eftir 12-talsstiganum.

Til §10
Ásetingin gevur landsstýrisfólkinum heimild til at áseta nærri karmar fyri próvtøkur og royndir sambært § 9, og skal ein próvtøkukunngerð síðani verða gjørd út frá hesum. Hetta er sami leistur, sum er nýttur í øðrum útbúgvingarskipanum.
Kunngerðin skal innihalda reglur viðvíkjandi møguleika fyri at taka roynd miðskeiðis í einari lestrarhálvu, í sambandi við eftirmeting av, um ein næmingur skal hava møguleika fyri at koma inn á hægri stig.

Til § 11
Teir skúlar, sum verða nýttir til samstarvsskúlar, hava longu í dag allir hvør sær ábyrgd av tí námsfrøðiliga, fakliga og fyrisitingarliga økinum í skúlanum. Henda ábyrgd fylgir við til annaðmálsundirvísing, soleiðis at skúlin hevur alla ta samlaðu ábyrgdina av námsfrøði, fakligheit og fyrisiting.

Stk. 2. Skúlarnir hava í dag rásarúm, hvat setan av lærarum viðvíkur, og er ynskið, at hetta eisini gerst galdandi, hvat lærarum í annaðmálsundirvísing viðvíkur.
Vísandi til, at annaðmálsundirvísing á ein serligan hátt hevur kjølfesti sentralt í UVS, og at undirvísingin á tí einkulta skúlanum skal hanga saman við undirvísingini innan annaðmál runt um landið, setur skúlin lærarar, men tó í samráð við UVS.

Av tí, at talan er um eina landsdekkandi skipan, kann tað í ávísum førum vera neyðugt at gera avtalu um, at ein lærari arbeiðir á ymiskum skúlum. Tískil verður latið upp fyri, at skúlarnir í samráð við Undirvísingarstýrið gera avtalur um hetta.

Til § 12
Undirvísing og útbúgving sambært hesi lóg eru sum útgangsstøði ókeypis, líknandi øðrum útbúgvingum á t.d. miðnámsskúlunum.

Stk. 2. Skeiðini sambært stk. 2 eru at rokna sum ein tænasta, sum eitt ávíst virki ella onnur kunnu biðja um, og verður tað tí heimilað landsstýrisfólkinum at taka gjald fyri hesa tænastu, sum kemur umframt ókeypis tilboðið um annaðmálsundirvísing sambært hesi lóg. Gjaldið má tó bert takast fyri veruligar útreiðslur í sambandi við umbiðin skeið (kostprís).

Til § 13
Av tí at talan er um eina nýggja og slóðbrótandi skipan, verður heimild givin til at seta eina nevnd, hvørs uppgáva er at vera landsstýrisfólkinum og Undirvísingarstýrinum til hjálpar, um ivamál um skipanina stinga seg upp.
Landsstýrisfólkið ásetur nærri reglur fyri virksemi nevndarinnar.

Til § 14
Avgerðir kunnu kærast til landsstýrisfólkið innan 1 viku eftir, at kærarin hevur móttikið avgerðina. Kærufreistin er sett til 7 dagar, soleiðis at henda kærufreist verður tann sama sum á

miðnámsútbúgvingum. At kærufreistin er sett til 7 dagar er tí, at tað er umráðandi, at t.d. prótøkugongd, próvtal o.a. ikki er farið úr minninum hjá teimum, sum skulu grundgeva fyri, hví eitt ávíst próvtal er ásett.

Landsstýrsifólkinum verður heimilað at ásetta nærri reglur um kærur.

Til § 15
Áseting um gildiskomu. Lógin kemur í gildi dagin eftir, hon er kunngjørd.

Til § 16
Vísandi til at talan er um nýggja skipan innan annaðmáls undirvísing og útbúgving, er neyðugt at eftirmeta, í hvønn mun skipanin livir upp til ynskt endamál ella ikki. Tískil verður álagt landsstýrisfólkinum at framleggja frágreiðing um 3 ár. Frágreiðingin eigur at vera til taks 3 ár eftir gildiskomu av hesi lóg.

Barna- og útbúgvingarmálaráðið, 7. mars 2024

Djóni N. Joensen
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1:Viðmerkingar frá Undirvísingarstýrinum
Fylgiskjal 2 og 3: Viðmerkingar frá NÁM
Fylgiskjal 4: Viðmerkingar frá Kommunufelagnum
Fylgiskjal 5: Viðmerkingar frá Miðnámi á Kambsdali
Fylgiskjal 6: Viðmerkingar frá Reyða krossi
Fylgiskjal 7: Viðmerkingar frá Útlendingastovuni
Fylgiskjal 8: Viðmerkingar frá Vinnuhúsinum
Fylgiskjal 9: Viðmerkingar frá Fróðskapasetri Føroya
Fylgiskjal 10: Viðmerkingar frá Umhvørvismálaráðnum
Fylgiskjal 11: Viðmerkingar frá Løgmálaráðnum
Fylgiskjal 12: Viðmerkingar frá Heilsumálaráðnum
Fylgiskjal 13: Viðmerkingar frá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum